# Skaldini geyla yvir býin

**Uttan mikrofon ella hátalarar ella nakað annað hjálpartól verða flestu av kendu føroysku yrkjarunum at hoyra í ymsum støðum í Havnini á ólavsøku**

## Licentia poetica



**Eirikur í Jákupsstovu**
eij@sosialurin.fo

Jóanes Nielsen, Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, Dávur í Dali, Aleksandur Kristiansen, Sólrún Michelsen, Katrin Reinert, Sigri M. Gaini, Malan Poulsen, Vónbjørt Vang, Ludvík Breckmann, Vagnur Streymoy, Carl Jóhan Jensen, Kjartan Hansen, Oddfríður Marni Rasmussen og Danmarksmeistarin í »Poetry Slam« Lasse Thorning.

Hesi fara øll at lesa yrkingar í ymsum søguligum støðum í Havnini á ólavsvøku. Ongin av teimum sleppur at styrkja røddina við hjálpartólum, so tað kann staðfestast, at eisini teir spakaru yrkjararnir sleppa at royna styrkina í síni rødd.

### Skaldsligt frælsi

Undir heitinum skaldsligt frælsi ella licentia poetica skipar Føroya Fólkaháskúli fyri tiltakinum ólavsøkudagarnar. Hetta er komið í staðin fyri vanliga fólkafundin, ið hevur verið á Fólkaháskúlanum.

- Vit hava broytt nógv á Fólkaháskúlanum seinastu árini, og hetta var eitt hugskot vit hildu vera áhugavert og forkunnugt, sigur Rói Patursson, stjóri á Føroya Fólkaháskúla.

Hann greiðir somuleiðis frá, at hetta er nakað fyri øll, sum hava áhuga.

- Ongin skal dragast til hetta tiltakið.

Sjálvur fer Rói Patursson ikki at bera nakað fram, men fer heldur at presentera hini skaldini.

### Søgulig støð

Fyri ikki at brenna alt krútið á einum stað, verður tiltakið skipað sum eitt slag av festivali.

Byrjað verður á Føroya Fólkaháskúla, har fólkafundur vanliga er um ólavsøkuna, og sum helst yvir øllum hevur verið eitt slag av friðskjóli hjá føroyskum skaldum seinastu mannaminnini.

Seinni verður William Heinesen heiðraður, tá kvinnur fara at frambera yrkingar við Tariru standmyndina, sum jú er ein figurur hjá Williami.

Miðbýurin fær eisini sítt, har Káta Hornið ella Glade Hjørn verður nýtt, og enn seinni verður farið í Gamla Kirkjugarð, har grøvin hjá Jørgeni Frantz Jacobsen verður nýtt til seinastu geylini hjá okkara fremstu skaldum.



Sosialurin

### Licentia poetica

**Ólavsøkuaftan**
*Føroya Fólkaháskúli klokkan 17:30*
Jóanes Nielsen, Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, Dávur í Dali og Aleksandur Kristiansen
*Tarira í Viðarlundini klokkan 21:00*
Sólrún Michelsen, Katrin Reinert, Sigri M. Gaini, Malan Poulsen og Vónbjørt Vang

**Ólavsøkudagur**
*Káta hornið klokkan 16:00*
Bárður Persson, Ludvík Breckmann, Vagnur Streymoy og Danmarksmeistarin í "Poetry Slam" Lasse Thorning
*Grøvin hjá Jørgen Frantz Jacobsen klokkan 21:00*
Carl Jóhan Jensen, Kjartan Hansen og Oddfríður Marni Rasmussen.